

# Samskipari til marknaðardeildina

Pf. Postverk Føroya stendur á gáttini til eina nýggja, spennandi og avbjóðandi framtíð, nú stovnurin er umskipaður til partafelag.

Pf. Postverk Føroya søkir í tí sambandi eftir einum fólki til marknaðardeildina.

Ert tú rætta fólkið fært tú stóra ávirkan á, hvussu sølu- og marknaðararbeiðið skal mennast.

**Førleiki**
Tú hevur hóskandi starvsroyndir innan marknaðarrøkt, dugir væl at samskifta og at samskipa t. d. lýsingarherferðir. Hevur royndir at fyriskipa og leggja framtíðarstrategiir. Dámar avbjóðingar og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Tíni eyðkenni er m.a., at tú røkkur tey mál, tú setur tær. Tú dugir væl at fáast við fólk, og hevur sostatt lætt við at skapa støðugt samband við viðskiftafólk og -stovnar.

Tú sært møguleikar heldur enn forðingar, samstundis sum tú ert før/ur fyri at arbeiða á ein bæði skapandi og ítøkiligan hátt. Umframt hóskandi útbúgving hevur tú kanska eisini royndir innan CRM, og hevur greiða fatan av møguleikunum innan KT. Eisini er tað ein treyt at tú dugir at arbeiða við forritunum Indesign, Photoshop og Illustrator.

**Postverk Føroya bjóðar tær**
eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv í umhvørvi við nútímans leiðsluhátti. Talan er um eitt krevjandi starv, og tí bjóða vit tær eina góða løn, samsvarandi førleika og royndum. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Umsókn**
Áhugað eru vælkomin at ringja til Heri Kjærbo, HR-stjóra, á telefon 23 60 95 og fáa meiri at vita. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir við hóskandi prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 28. september 2007 og verður at senda til:

**Pf. Postverk Føroya**
Att.: Heri Kjærbo
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
ella um teldupostin til: heri@postverk.fo

Stutt um Postverk Føroya
280 fólk arbeiða hjá Pf. Postverki Føroya. Tann 1. januar 2005 varð postverkið umskipað frá almennum stovni til partafelag við Føroya Landsstýri sum eigara. Høvuðsskrivstovan, miðdepilin fyri alla útbering felagsins, er á Óðinshædd í Havn. Saman við samstarvsfeløgum veitir Postverk Føroya bestu flutningstænastu og dygdarbestu viðgerð úti og heima.

Postverk Føroya
– okkara samskiftisfyritøka

postverk.fo



# Avbjóðandi starv sum speditørur

Tú hevur nú møguleikan at søkja eitt spennandi og avbjóðandi starv í Pf. Postverk Føroya.

Tú kemur m.a. at samskifta við flutningsfeløg, virkir og kundar. Geva tilboð uppá frakt innan- og uttanlands og avgreiða skjøl í samband við inn og útflutning.

Virksemið á Vinnudeildini er vaksandi og tú kanst vera við til at ávirka dagligu gongdina á deildini.

**Førleikar**
Tú hevur útbúgving sum speditørur. Tú dugir væl at samskifta við viðskiftafólk, innan- sum uttanlands, og tú ert skjótur í verki og til verka. Vit vænta, at tú kennir flutnings- og tollviðurskifti í Norðurlondum.

Tíni eyðkenni eru m.a., at tú røkkur teimum málum, tú setur tær. Tú dugir væl at fáast við fólk og sært møguleikar heldur enn forðingar. Tú hevur hug at menna teg innan logistikk og nýskapan.

**Postverk Føroya bjóðar tær**
eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv í umhvørvi við nútímans leiðsluhátti. Starvið er krevjandi, og tí bjóða vit tær góða løn, samsvarandi førleika og royndum. Starvið verður sett skjótast til ber.

**Umsókn**
Áhugað eru vælkomin at ringja til Hera Kjærbo HR-stjóra á telefon 236095 at fáa meira at vita. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir við hóskandi prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 28. september 2007 og verður at senda til:

Pf. Postverk Føroya
Heri Kjærbo
Óðinshædd 2
FO-100 TÓRSHAVN
ella um teldupost til: heri@postverk.fo

Stutt um Postverk Føroya
280 fólk arbeiða hjá Pf. Postverki Føroya. Tann 1. januar 2005 varð postverkið umskipað frá almennum stovni til partafelag við Føroya Landsstýri sum eigara. Høvuðsskrivstovan, miðdepilin fyri alla útbering felagsins, er á Óðinshædd í Havn. Saman við samstarvsfeløgum veitir Postverk Føroya bestu flutningstænastu og dygdarbestu viðgerð úti og heima.

Postverk Føroya
– okkara samskiftisfyritøka

postverk.fo